

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 02 - 2012

# Ovin Carlsson farin

Fyrrverandi stjórin í danska frálandareiðarínum Esvagt, Ovin Carlsson, doyði um vikuskiftið, 63 ára gamal. Ovin var føddur á Tvøroyri, men búði meginpartin av lívinum á Fanø saman við konu og børnum. Hann telist uttan iva millum teir føroyingarnar, sum hava virkað longst innan frálandavinnuna og havt ávirkan á hennara menning. Ovin Carlsson varð settur stjóri í Esvagt í 1997, og hann sat í hesum starinum til 2010. Hesi árini vóru sera hendingarrík hjá Esvagt, sum økti skipatalið úr 10 upp í 31, meðan Ovin stóð á odda fyri tí. Áðrenn hann fór frá, hevði felagið skrivað undir sáttmála um trý skip afturat - eitt nú tey sonevndu X-bov skipini, sum hann dugdi at síggja ein stóran fyrimun í. Eftir tíðina hjá Esvagt arbeiddi Ovin sum stjóri hjá HSSEQ hjá Switzer, og tað seinasta árið var hann stjóri á Maersk Training í Esbjerg.